Elektriskir stoytir og refleksbjargingar

Hetta er gerandisdagurin hj 17 ra gamla Karstin r Klaksv k, sum er l ru sum elektrikkari, umframt at hann eisini er s ttm labundin KŒ m lverji

FRÓ›I LØKSÁGAR‹

Ta› er fríggjadagur og klokkan er gott hálvgum tvey, og Yngd hevur sett Karstin Joensen stevnu á veg heim úr skúlanum. Hugnaliga kaffistovan á Fornagør›um er sta›i› vit hava avtala at hittast til eitt prát. Karstin, sum fór í læru sum elektrikkari í januar mána›a, gongur í løtuni á tekniska skúla í Klaksvík, og har ver›ur hann verandi til tær ásettu 20 vikurnar, sum fyrsta skúlaskei› tekur, eru av.

Karstin letur rættuliga væl at skúlagongdini á Tekniska Skúla, og sigur at hetta er naka› heilt anna› enn at ganga í fólkaskúla. Hann sigur, at løgi› nokk so dámar honum rættuliga væl á Tekniska Skúla, sjálvt um hann aldrin tímdi at vera í skúla, tey 10. árini hann gekk í skúlanum á Ziskatrø›. — Eg haldi at eg var meiri í skúlagar›inum vi› einum bólti enn eg sæt í skúlastovuni millum bøkur og bl‡antar. Sigur Karstin vi› einum skuldartyngdum smíli.

Alt ov vánaligur

Áhugin fyri fótbólti hevur altí› veri› til sta›ar. Karsten byrja›i at spæla fótbólt vi› KÍ sum seks ára gamal. Tá fór hann at venja vi› smápiltali›num hjá KÍ. Ta› fyrstu tí›ina royndi hann seg sum útispælara, men ta› gekk ikki long tí› til hann enda›i millum stengurnar, og har hevur hann havt pláss sítt líka sí›ani. — Eg var ein elendigur útispælari, bæ›i eg, og øll onnur, dugdu at síggja, at skuldi ta› blíva til naka›, so mátti eg í máli› at standa. Hetta er ein avger› sum hann ongantí› hevur angra›.

Ta› gekk ikki long tí› til at bæ›i venjarar og vi›leikarar dugdu at síggja, at her var talan um ein ungan mann vi› rættuligum evnum fyri málmansgerninginum, og bo› vóru eisini eftir honum til landsli›i›. Landsli›i› her er talan um, er U14 landsli›i›, har Karstin vardi máli› í eina tí›, til hann, eitt ár ov tí›liga, bleiv úttikin til U16 landsli›i›. Spurdur um hvussu hetta bar til svarar Karsten heldur seigliga — Ta› var nokk rættuligt málmanstrot hjá hasum árganginum.

Karstin letur rættuliga væl at tí landsli›sarbei›i, sum er fyriskipa› fyri teir yngru leikararnar her heima. Her ver›ur sjálvandi hugsa› um tey sonevndu U landsli›ini. Í løtuni verjir Karstin máli› fyri U18 landsli›i›, sum hevur tvær kappingar á skránni í summar, ávíkavist í Onglandi og í Italien. — Landsdystirnir, geva rættuliga nógv. Eitt nú er fer›in rættuliga høg, umframt at vit eisini fáa alltjó›a royndir, sum avgjørt koma okkum til gó›ar aftur seinni, sigur Karstin, sum svar uppá spurningin um hvønn t‡dning ungdómslandsli›ini hava fyri teir ungu leikararnar.

Skriva› undir sáttmála

Naka› herfyri bórust tí›inindini, um at KÍ hev›i skriva› sáttmála vi› nakrar av sínum ungu leikarum, og var Karstin millum teirra sum høvdu skriva› undir. — Hetta er sjálvandi ikki naka› vit blíva ríkir av, men ta› eru ávísar útrei›slur kn‡ttar at tí at spæla fótbólt, og nú átekur KÍ sær so ein part av teimum. Her verur serliga hugsa um klæ›ir og anna› i› skal til tá vant ver›ur. - Umframt hetta so er ta› eisini gott fyri okkum at hava fingi› ein sáttmála, ta› er vi› til at styrkja okkara persónligu disciplin. - Tú hevur skriva› undir uppá at vera vi›, so her hjálpir ikki at sløsa vi› venjingi, tú ert noyddur at møta hvørja fer›, og geva teg fult út. Karstin heldur eisini at sáttmálin er vi› til at skapa eina mynd av hvussu ta› er royna seg sum fulltí›arfótbóltsleikara, sum nokk er dreymurin hjá teimum flestu ungu leikarunum í felagnum sum vilja naka› vi› fótbóltinum.

Fyrimyndirnar

Øll hava sínar fyrimyndir tá ta› kemur til ta› tey takast vi›, hvat antin ta› er ítróttur, tónleikur, filmur, skaldskapur ella okkurt heilt anna›. Vit spurgdu eisini Karstin um ta› var nakar málma›ur hann sá upp til. — Úti í heimi er ta› Gianluca Pagiluca hjá Bologne sum er tann stóra hetjan, og her heima er ta› Jakup Mikkelsen, og eftir ein stuttan steg› leggur hann afturat vi› einum skálkasmíli -..... skriva bara Jógvan Linklett eisini, hann er lærari hjá mær í skúlanum. Óney›ugt er kanska at siga at Jógvan Linklett var ein av fremstu málmonnunum her heima í sjeyti og áttáti árunum, og er eisini ma›urin sum Jákup Mikkelsen landsli›smálma›ur fleiri fer›ir hevur nevnt sum eina av sínum fyrimyndum. Av teimum nevndu er ta› serliga Pagiluca sum er tann heilt stóra fyrimyndin. —Eg havi fylgt honum í eini 8 ár nú, hann er bara nógv tann besti, hann hevur alt sum ein málma›ur skal hava. Men tá vit spurgdu Karstin um hvat ein gó›ur málma›ur var, var eitt sindur verri at fáa eitt greitt svar. — Hann skal kunna meira enn bara gera gó›ar bjargingar,...øhm, eg haldi ikki eg orduliga eri førur fyri at svara hasum spurninginum, hatta er ein trupul spurningur. Hann ger tó greitt at hann ikki dámar hesar su›urlendsku málmennirnar sum eru líka nógv útispælarar sum málmenn.

Dreymarnir

Vit spurgdu eisini Karstin um hvørjar ætlanir hann hev›i fyri fótbóltin. — Fyrsta ambitiónin er sjálvandi at fáa fast pláss í fyrstu deild, og aftan á ta› er ta› nokk dreymurin um A-landsli›i›. Men vónirnar um at røkka fyrstu deild í ár, eru ikki stórar. Karstin heldur at ta› er meiri realistiskt at seta nøsina upp eftir einum plássi millum stengurnar á a›ru deildar li›num hjá KÍ, umframt at hann eisini fer at verja KÍ-máli› í unglingadeildini, sum hann heilt vist vantar fara at koma langt í ár. — Ta› er eisini í ordan, at taka eitt ár í a›ru deild. - Eg mangli royndirnar, og eg eri eisini ungur og havi tí›ina fyri mær. Eftir hetta var sjálvandi upplagt at spyrja um hansara ambitiónir ikki rukku út um landoddarnar. —Jú eg ætli mær allan vegin, sjálvandi er dreymurin at enda í útlendskum fólbólti har man kann liva av tí. Spurgdur um hann hev›i naka› felag í huganum har hann serliga kundi hugsa sær at enda, var svari › knapt — United.

Eg hati at tapa

Higartil hava Karstin og li›felagarnir, ikki megna› at vunni› naka› meistaraheiti í yngru deildunum, men sum sagt, so vónar og væntar hann, at hetta ver›ur í ár í unglingadeilini. —Sjálvt um vit nokk koma at hava ta› yngsta li›i› í kappingini, so trúgvi eg veruliga uppá at ta› kann lata seg gera. Av tí at Karstin ongantí› enn hevur vunni› naka› meistaraheiti fyri KÍ, so er ta› landsli›i› hann nevnir tá hann ver›ur spurgdur um hvat er hansara stórsta løta sum fótbóltspælari. - Ein javnleikur móti Armenien, er tann løtan sum hann minnist vi› stórst gle›i afturá. Hesin dystur er samstundis eisini einasti landsdystur hann hevur spælt fyri Føroyar sum ikki er enda›ur vi› tapi. Eitt hitt stórsta skuffilsi, sigur hann vera ein dyst móti Íslandi vi› U16 li›num, har hann aftana at bara 3. min. vóru leiktir, gjørdi eitt brotsspark, sum hann ikki megna›i at taka. —Sovori› i›rar meg, eg hati at tapa. Hjá mongum sum hava veri › vi› í ítrotti í mong ár, so hendur ta› vi› hvørt at hugurin ikki longur er til sta›ar, og tankarnir um at leggja ta› heila á hillina byrja at koyra runt í bakhøvdinum, og hetta er onkuntí› eisini hent hjá Karstin. —Tá er ta› at familjan tra›kar til, serliga beiggi mín hevur veri› óførur at stu›la mær í at halda fram, men foreldrini hava eisini altí› bakka meg 100% upp. —Eg hev›i nokk veri › dartspælari í dag um eg ikki hev›i tiki› fótbóltin frammum, sigur Karstin tá vit spyrja hann um hvat hann hev›i gjørt um hann ikki spældi fótbólt. Hann sigur at dart hev›i hansara stóra áhuga á›renn hann alvorliga kasta›i seg yvir fótbóltin, og at hann líka so væl kundi› havt valt ta› frammum.

Karstin er eisini anna› enn fótbóltur. Dagliga er hann í læru sum elektrikkari, og í frítí›ini, tá fótbóltur ikki er á skránni, er hann aktivur innan hondbólt. Hann er nevndarlimur í Stjørnuni, har hann eisini spælir á 2. deildar li›num. Umframt allar hesar kropsligu aktivitetirnar so hevur Karstin eisini eitt lív í cyberspace. Faroese_chat eitur forumi› har tú kanst hitta luca (eitt navn vi› íblástri frá einum heimskendum málmanni). Karstin vi› gongur at nógv tí› er í seinastuni farin framman fyri telduskíggjan, men enn er ta› ikki blivi› til nakra cyberrommansu. Uppá spurningin um hann hev›i funni› sær eina gentu var svari› eitt, kontant — NOY ! eg havi tí›ina fyri mær. Vit á Yngd ynskja Karstin gó›an byr framyvir.